# KT og smáskúlar




Alexander Jespersen
Sandoyar Meginskúli

# Innihaldsyvirlit


KT og smáskúlar ....... 1
Innihaldsyvirlit ....... 2
Inngangur ....... 4
Endamál ....... 4
Fyrireiking ....... 5
Túrar út á skúlarnar ....... 5
Regluligt samband við skúlarnar ....... 6
Lýsing av økinum ....... 7
Fyrireiking av spurnarbløðum ....... 7
Fyrireiking av uppteljing ....... 8
Viðgerð av spurnarbløðum og uppteljing ....... 8
Niðurstøður: ....... 9
A. KT-støði og -útbúgving ....... 9
B. KT í undirvísingini ....... 10
C. Lærarasamstarv á tínum skúla ....... 10
D. Lærarasamstarv millum skúlar í Sandoyar-Skúvoyar økinum ....... 11
E. Námsfrøðiligt og tøkniligt samstarv millum skúlar við hjálp av KT-tøkni ....... 12
F. KT-menning ....... 13
G. KT-kortið ....... 14
Samanumtøka, var rokkið á mál við lutmálunum? ....... 16
Hvat gera vit nú, nøkur uppskot ....... 16
Fylgiskjøl: ....... 18
Sandoyar Meginskúli ....... 18
Skúlin ....... 18
Lærarar ....... 19
Næmingar ....... 20
Lærarar á Meginskúlanum 1971-2001 ....... 22
Skopunar skúli ....... 27
Skúlin ....... 27
Lærarar ....... 28
Næmingar ....... 28
Sands skúli ....... 30
Skúlin ....... 30
Lærarar ....... 31
Næmingar ....... 31
Skúvoyar skúli ....... 33
Skúlin ....... 33
Lærarar ....... 34
Næmingar ....... 34
Skálavíkar skúli ....... 35
Skúlin ....... 35
Lærarar ....... 36
Næmingar ....... 36
Húsavíkar skúli ....... 37
Skúlin ....... 37
Lærarar ....... 38

Næmingar ........ 38
Dals skúli ........ 39
Skúlin ........ 39
Lærarar ........ 40
Næmingar ........ 40
Slóðir ........ 41

Spurnarbløð (Word dokument)

Uppteljing (Exel rokniark)

Ein grein (Undervisning under udvikling)

# Inngangur

Verkætlanaruppgávan KT og smáskúlar er síðsti partur av eini tvey ára útbúgving til telduvørð í Fólkaskúlanum.

Seinastu 25 árini hevur undirritaði starvast sum lærari við Sandoyar Meginskúla. Áhugin fyri teldum í skúlasamanhangi varð kveiktur á einum árskeiði á DLH skúlaárið 1986/1987, har nógv orka bleiv nýtt til hetta nýggja økið "informationsteknologi".

Fyri umleið 10 árum síðani fekk Meginskúlin sínar fyrstu teldur: 20 stk. 386 PC' arar. Tá høvdu neyvan nógv hugsað sær, at teldur fóru at koma í hvønn skúla og hvørt heim, og at hetta fór at kolrenna allan skúlaskap.

Sandoyar Meginskúli er landafrøðiligi miðdepilin í skúlaskapinum í Sandoynni og Skúvoynni, og allir bygdanæmingarnir koma í 5. ella 6. flokki inn á Meginskúlan, undantikin er Skúvoyggin, har næmingar bert onkuntíð koma í 8. ella 9. flokk.

Tað er tí nátúrligt, at samstarvið millum bygdaskúlarnar og Meginskúlan er á einum høgum støði til gagns fyri næmingar og foreldur.

Nú allir skúlar hava fingið teldur, skuldi einki verið til hindurs fyri at nýtt hesi framkomnu tøkniligi amboð til at samstarva og samskifta við. Her eru nýggir møguleikar, ið eiga at verða troyttir.

Av framman fyri standandi skilst, hví "KT og smáskúlar" er valt sum evni fyri verkætlanaruppgávuni.

# Endamál

**<u>Høvuðsendamálið við uppgávuni:</u>**
At kanna tann týdning KT kann fáa fyri skúlaskapin í einum skúlaøki, sum er gjørt úr einum størri skúla og fleiri smáum.

**<u>Lutmál:</u>**
Eg fari at hyggja eftir hvønn týdning, lærarar í økinum halda, KT kann hava fyri:

- Námsfrøðiligu, tøkniligu og sosialu menningina av tí lítla bygdaskúlanum
- Námsfrøðiligu, tøkniligu og sosialu menningina av samstarvinum millum bygdaskúlar í einum og sama skúlaøki
- Leiðbeining og hjálp á námsfrøðiliga og tøkniliga økinum til smærri skúlar
- Betri at gagnnýta lærarakreftirnar í einum skúlaøki gjørt úr fleiri smáum skúlum

**<u>Viðmerkingar:</u>**
Vísandi til inngangin, har nevnt verður, at Sandoy og lutvíst Skúvoy er eitt skúlaøki, og har næmingar úr øllum bygdunum fyrr ella seinni koma í samband við Meginskúlan, verður í høvuðsendamálinum miðað eftir at kanna, um ikki lærarar halda, at KT onkursvegna betri kann

binda teir einstøku partarnar í økinum saman. Í hesum samanhangi eisini fáa innlit í, hvat lærararnir á teimum 7 skúlunum halda um verandi samstarv skúlarnar ímillum.

Í lutmálunum sæst, at stórur dentur verður lagdur á at knýta tað námsfrøðiligu og tøkniligu menningina saman, tí KT eigur ongan rætt í fólkaskúlanum, uttan so at hon eisini fær týdning fyri tann námsfrøðiliga og sosiala partin av skúlaskapinum. Eisini verður miðað eftir, at kanna í hvønn mun teir smáu skúlarnir hava tørv á leiðbeining og hjálp bæði á tí tøkniliga og námsfrøðiliga økinum. Og til seinast um ikki tær fakligu kvalifikatiónirnar hjá lærarunum í økinum í nógv størri mun enn nú kunnu koma øllum skúlunum til gagns.

## Fyrireiking

Tað skerst ikki burtur, at tá ein hevur virka í 25 ár á Sandoyar Meginskúla, er vitanin um sjálvan Meginskúlan og eisini teir einstøku bygdaskúlarnar á einum hampiliga góðum støði.

Men tá nágreiniligir upplýsingar um skúlarnar og kanska í onkrum føri privatir upplýsingar um lærararnar skulu fáast til vega, má samband takast upp við leiðslurnar á bygdaskúlunum og neyðug loyvi at koma inn á skúlarnar innheintast . Tá hetta er gjørt  sleppst framat at býta spurnarbløð út til lærararnar og leiðslurnar. Í samrøðum fæst eisini fram, hvat lærararnir á skúlunum halda um KT sum amboð til at samstarva við og til at knýta skúlaøkið tættari saman við.

Leiðslurnar á skúlunum eru allar ringdar upp og ein hóming var fingin av, hvat hevði serligan týdning fyri tann einstaka skúlan.

Fyri at lætta um samskiftið valdi eg beinanvegin at gera eitt tøkniligt yvirlit yvir økið: leiðslurnar á skúlunum, lærarar ár 2001 á einstøku skúlunum, næmingar í flokkunum, tal av flokkum, myndir av skúlunum, tekning av Sandoyar-Skúvoyar skúlaøkinum, ymisk data um tann einstaka skúlan, frástøður í km skúlarnar millum, telduútbúnað á skúlunum o.a.

Eisini varð eitt stórt arbeiði lagt í at gera yvirlit yvir starvssetanir á Sandoyar Meginskúla, tey 30 árini skúlin hevur verið til, hetta fyri at síggja, um lærarar støðast á skúlanum og í Sandoynni.

## Túrar út á skúlarnar

Skjótt gjørdist mær greitt at samband einans yvir telefonina ikki var nøktandi. Skuldi bert ein nøkurlunda sonn mynd fáast av skúlunum varð neyðugt at koyra og sigla til bygdaskúlarnar fyri har við egnum eygum at síggja, hvussu skúlarnir vóru innrættaðir, og hvussu fólkið á skúlunum starvaðist bæði tøkniliga og námsfrøðiliga.

Tann veruleiki, at námsfrøði og tøkni nú meira enn nakrantíð áður eru runnar saman til eina eind, gjørdi at eg setti mær henda spurning: Hvussu brúkar tann einstaki lærarin hesa nýggju tøknina í undirvísingarhøpi. Niðanfyri eru nakrir tankar, eg gjørdi mær aftaná fyrstu túrarnar:

Í nógvum førum stendur lærarin uppi yvir teldunum, sum ryssa uppi yvir deyðum fyli. Hann veit ikki síni livandi ráð, meðan næmingurin fegnast um hetta óføra leikutoy, hann hevur fingið.

Gamalt var, at har næmingurin ikki var førur fyri at ganga sjálvur, leiddi lærarin hann fram á mál, gjøgnum illa gongd øki til nýggj og spennandi støð.

Vandi er fyri, at næmingurin fullkomiliga tekur ræði á lærarанum á hesum týðandi øki, og at teldurnar ikki verða annað enn leikutoy, um ikki lærarin eisini í líka stóran mun sum næmingurin tekur hesa nýggju tøknina til sín.

Ein annar møguleiki er sjálvandi, at um lærarin ikki hættar sær í holt við teldurnar, koma tær at standa og savna støv, til tær um fá ár eru forngripalutir. Tað hevði verið bæði synd og skomm um nógvu pengarnir, sum kommunurnar hava brúkt, soleiðis skuldi farið fyri skeyti.

At so er kemur eisini til sjóndar í fyrstu samrøðunum, eg hevði við bygdalærararnar:

<u>Kristina í Skálavík tók soleiðis til:</u>
”Hvat gera vit við teldurnar?” Hon hevur fingið KT-kort Fólkaskúlans, men sigur: ”KT-kortið er ikki nóg mikið, neyðugt er við meira kt-frálæru til læraran.

<u>Andras á Sandi sigur:</u>
”Hvat brúka vit teldurnar til?” ”Hvussu fáa vit í einum lítlum skúla, har tímarnir eru ov fáir, og flokkarnir eru samanlagdir, tíð til eisini at taka teldurnar við í undirvísingina.”

Tað er so, at í Sands Skúla eru fýra árgangir saman tveir og tveir, og hetta krevir nógv av læraranum. Við fleiri sløgum av teldum, bæði Mac’um og PC’arum verður trupult hjá skúlanum, uttan góða hjálp uttanífrá at arbeiða. Tí heldur Andras, at bara eitt slag av teldum skal vera á skúlanum.

<u>Inga í Skúvoy:</u>
Serliga Inga følir, at samstarv skúlarnar ímillum er av stórum týdningi. Hon er serstakliga positiv hesum viðvíkjandi og kennir á sær, at góð hjálp og íblástur uttanífrá er alneyðug, skal lærarin trívast á smáplássinum. Eisini er tað mennandi fyri næmingin, at fáa samband dagliga við aðrar næmingar úr øðrum bygdum. Og hetta kann vera trupult, tá ein býr á lítlari oyggj sum Skúvoy, har skúlabørnini tilsamans eru ikki fleiri enn 11.

*Hvat siga onnur: **<u>Undervisning under udvikling</u>**

## Regluligt samband  við skúlarnar

Alla tað tíð arbeitt hevur verið við verkætlanaruppgávuni, havi eg roynt at havt eitt gott samstarv og samband við bygdaskúlarnar.

Telefonin og e-posturin hava verið nógv nýtt, men í fleiri førum hevur verið neyðugt at gera túrar út á skúlarnar.

Í hesum sambandi havi eg varnast, at á flestu støðum er tørvur á at fáa hjálp til teldurnar, bæði til tøkniliga og námsfrøðiliga partin.

Eftir førimuni havi eg so veitt nakað av hjálp, tó at hetta bert á Meginskúlanum er partur av mínum starvsøki.

Í aðrar mátar hevur hetta givið eitt gott innlit í tær teldur, netskipanir, tilfar o.a. sum tann einstaki skúlin nýtir, og soleiðis verið ein góð hjálp til sjálva uppgávuna.

## Lýsing av økinum

Eg havi valt at lýsa Sandoyar-Skúvoyar øki nágreiniliga, bæði tá tað snýr seg um landafrøðiliga partin, tøkniliga partin og hvat lærarar og leiðslur halda um KT og smáskúlar.

Illa ber til at siga nakað generelt um KT og smáskúlar uttan at hava nakað av vitan um, í hvussu so er eitt serstakt øki, og kanska eru økini í landinum so ymisk, at ikki er møguligt at halda nakað generelt um tey einans út frá Sandoyar-Skúvoyar økinum.

Tað, sum hevur størsta týdning í samband við mína uppgávu, er sjálvandi, hvussu Sandoyar - Skúvoyar skúlaøki kann mennast. Hvussu onnur ynskja sítt øki at mennast, verður upp til tey sjálvi.

## Fyrireiking av spurnarbløðum

Út frá teimum nógvu samrøðunum við lærarar í skúlaøkinum og við at fara á internótina at leita er spurnarblaðið gjørt.

<u>Dentur hevur verið lagdur á:</u>

- at hava nógvar spurningar, soleiðis at lærarin veruliga kann koma til orðanna
- at spyrja bæði breitt og djúpt um KT og smáskúlar
- at lata KT og námsfrøði vera natúrligir partar av somu eind
- at evna spurningarnir til so at lætt er telja upp
- at lata aldur, kyn og skúlaslag verða bólkar fyri seg

Tað var eitt ógvuliga tíðarkrevjandi arbeiði at innheinta svørini. Eg gjørdi mær tann ómak at fara heim til hvønn einstakan lærara við spurnarblaðnum. Har tosaðu vit undir fýra eygum um hvønn einstakan spurning. Hetta fyri at eingin misskiljing skuldi vera, og eisini fyri at tryggja mær at spurningarnir vóru viðgjørdir í álvara. Umframt at fáa svara spurningunum varð eisini samrøtt um mong onnur týðandi viðurskifti, ið hava tilknýti til skúlan.

## Fyrireiking av uppteljing

Tá spurnarblaðið, sum er eitt Word-skjal, varð evnað til, var ætlanin, at uppteljingin skuldi skrivast og viðgerast í einum rokniarki. Her ber til at filtrera svørini, soleiðis at ávísir spurningar kunnu takast fram eftir ávísum krøvum.

Greitt er, at á henda hátt kunnu svørini viðgerast á næstan ótaldar mátar, og uppgávan má tí verða at finna tey øki, sum miðað varð ímóti í endamálinum í uppgávuni.

Eisini ber til í Excel rokniarkinum á ein lættan hátt at telja svørini saman og finna prosentvísa býti.

Nógvir og langir spurningar fylla nógv á rokniarkinum, men svørini lutfallsliga lítið. Verður "kommentar" amboðið í rokniarkinum nýtt, ber til at flyta vísan á lítla reyða tríkantin, og har síggja sjálvan spurningin. Á henda hátt verður arkið nógv greiðari og lættari at lesa.

## Viðgerð av spurnarbløðum og uppteljing

Spurnarblaðið er býtt upp í 7 partar við hesum yvirskriftum:

A. KT-støði og -útbúgving
B. KT í undirvísingini
C. Lærarasamstarv á tínum skúla
D. Lærarasamstarv millum skúlar í Sandoyar-Skúvoyar økinum
E. Námsfrøðiligt og tøkniligt samstarv millum skúlar við hjálp av KT-tøkni
F. KT-menning
G. KT-kortið.

Uppteljingarskjalið er gjørt eftir sama leisti og liggur tí eisini í 7 pørtum, men við tí undantaki, at skúlaslag, kyn, aldur og útbúgving verða endurtikin fyrst í hvørjum parti.

**Uppteljing skúlaslag:**
Uppteljingin vísir at bygdalærararnir og Meginskúlalærararnir eru líka nógvir í tali, 12 í hvørjum skúlaslag.

**Uppteljing kyn:**
Í øllum økinum eru 10 menn og 14 kvinnur. Á meginskúlanum 7 menn og 5 kvinnur og á bygdaskúlunum 3 menn og 9 kvinnur.

<u>Niðurstøða:</u> Verður hugt at øllum økinum undir einum er kynsbýtið hampuliga javnt, men í bygdaskúlunum eru tríggjar ferðir so nógvar kvinnur sum menn.

**Uppteljing aldur:**
Í øllum økinum eru 16 lærarar eldri enn 45 ár og 8 yngri enn 45 ár, í Meginskúlanum 9 eldri enn 45 ár og 3 yngri enn 45 ár, í bygdaskúlunum 7 eldri enn 45 ár og 5 yngri enn 45 ár.

Niðurstøða: Aldursbýtið í Sandoyar-Skúvoyar økinum er ójavnt, heili 67% av øllum lærarunum eru farnir um hálvan starvsaldur, og støðan á Meginskúlanum er uppaftur meira greflig, tí har eru 75% av lærarunum í tí eldra partinum.

Verður hugt samstundis at kynsbýtinum og aldursbýtinum fyri bygdaskúlarnar sæst, at allir teir ungu lærarnir har eru kvinnur.

**Uppteljing útbúgving:**
Av teimum 24 lærarunum í øllum økinum eru bert tveir við ongari útbúgving, so tað má sigast at verða á góðari leið.

Viðmerking: Soleiðis hevur tó ikki altíð verið, tí eitt av tí, sum eyðkennir Sandoyar Skúvoyar skúlaøki er, at ringt hevur verið at fáa lærarar at støðast. Hetta sæst í einari uppteljing, sum er at finna undir "Fylgiskjøl, Sandoyar Meginskúli, Lærarar á Meginskúlanum 1971-2001." Tey 30 árini, síðani Meginskúlin varð bygdur, hava 131 starvsetingar verið, hetta skal samanberast við, at bert 12 lærarar eru í starvi har. Ein stórur partur av hesum 131 vóru fólk við ongari læraraútbúgving.

Fryktandi er fyri at við lutfallsliga gomlum lærarum, sum skjótt fara úr starvi, er stórur møguleiki fyri, at óútbúgvi fólk um ikki so langa tí aftur fer at røkja læraraarbeiðið á Meginskúlanum.

Lætt er tí at ímynda sær standin á skúlanum um størri parturin av undirvísarunum onga útbúgving hevur, tí tað gongur illa upp hjá útbúnum lærarum at halda seg ajour við tað stóru menning, sum fer fram innan allan skúlaskap.

Tá verður í uppaftur størri mun enn nú neyðugt at gagnnýta tað útbúnu arbeiðsmegini, sum er at finna í Sandoyar Skúvoyar økinum, tað veri seg á Meginskúlanum ella teim smáu bygdaskúlunum. Og her kan vónandi KT tøknin koma økinum til hjálpar.

# Niðurstøður:

## A. KT-støði og -útbúgving

Í A-partinum av spurnarblaðnum verður kannað, um lærarar í Sandoyar-Skúvoyar økinum eiga teldu heima, í hvønn mun teir nýta telduna, og hvussu teir sjálvir halda, at KT-støði kann hækka.

**Heimatelda:**
Heili 88% eiga eina góða og nýtímans teldu við internetsambandi. 63% av lærarunum brúka telduna hampuliga nógv, og eingin er púra sørur.

**Útbúgving og vegleiðing:**
Ein meiriluti heldur, at styttri skeið (sum tað við KT-kortinum) er rætti mátin at gerast betri KT-brúkari. Tað sama er galdandi, tá mett verður, um KT-vørðurin er neyðugur ella ikki.

Ein stórur partur heldur, at hetta at arbeiða saman við starvsfeløgum um KT er ein gongd leið. Bert fá halda at til ber at menna seg saman við næmingunum.

Verður filtrið í rokniarkinum nýtt sæst, at fyri alt økið eru tað einamest kvinnurnar (9 av 14), sum ynskja at menna seg við at fara á styttri skeið. Helvtin av monnunum halda hinvegin, at longri skeið (ársskeið) er rætta leiðin at ganga.

Verða teir eldri og yngri lærararnir sammettir sæst, at teir eldri hava størri brúk fyri KT-vørðinum ( 11 av 16) enn teir yngru (2 av 8).

Niðurstøða: Sigast kann , at lærararnir í økinum eru væl við, tá tað snýr seg um egið brúk av telduni, men at tørvurin á at menna seg á telduøkinum er stórur.

## B. KT í undirvísingini

Í B verður fokusera á, í hvønn mun lærarar nýta KT í síni undirvísing, bæði undan og aftaná at KT-kortið er tikið, og hvat tann einstaki lærarin heldur um egið KT-brúk í undirvísingini í mun til starvsfelagar.

**KT-brúk áðrenn og aftaná KT-kortið:**
75% av lærarunum nýttu als ikki ella bert eitt lítið sindur KT í undirvísingini, áðrenn KT-kortið varð tikið.

Heili 67% meta seg at hava fingið stóra nyttu av KT-kortinum og brúka KT meira nú. Bert 4% nýta als ikki KT í undirvísingini, aftaná at KT-kortið er tikið.

**KT-brúk í mun til starvsfelagar:**
63% av lærarunum meta seg at vera miðalbrúkarar, 29% smábrúkarar og bert 8% at vera stórbrúkarar av KT í undirvísingini.

Verður filtrið brúkt, sæst at allir teir 7 lærararnir, sum halda seg brúka telduna minni enn aðrir lærarar, koma úr tí eldra bólkinum.

Niðurstøða: Lærararnir halda seg sum heild at hava fingið væl burtur úr undirvísingini í samband við KT-kortið, og hevur hetta hækkað støðið á undirvísingini í skúlunum. Um tveir triðjapartar av lærarunum føla, at teir eru ikki verri fyri enn aðrir, tá tað snýr seg um KT-undirvísing. Tó skal sigast, at umleið ein triðjaparturin heldur seg illa til at nýta teldurnar í undirvísingini, og hetta eru serstakliga teir eldru lærararnir.

## C. Lærarasamstarv á tínum skúla

Í C verður samstarvið um undirvísing á egnum skúla tikið fram. Eisini um undirvísingin í samband við KT-kortið hevur bøtt um samstarvið, ikki bert á KT-økinum.

**Samstarv á egnum skúla:**
67% halda, at samstarvið á skúlanum er ov lítið ella ikki til, 33% at tað er í lagi. Á Meginskúlanum eru tað 10 av 12, sum halda tað fyrra t.v.s. 83%.

97% halda, at ongantíð ella bert av og á verður arbeitt í toymum um flokkar og bólkar á skúlanum.

75% av lærarunum lata ella lána av og á ella ongantíð tilfar til og frá starvsfeløgum á egnum skúla.

**Arbeiðið við KT-kortinum:**
50% halda, at samstarvið um KT, aftaná at KT-kortið er tikið, er enn vánaligt ella ikki nóg gott. Hini 50% 'ini halda, at tað er í lagi ella sera gott. Tølini fyri Meginskúlan eru 67% og 33% og fyri teir smáu skúlarnar øvugt 33% og 67%.

54% halda, at arbeiðið við KT-kortinum hevur als ikki bøtt um samstarvslagið á skúlanum, 33% at tað hevur bøtt eitt sindur.

Niðurstøða: Her er sanniliga nakað at arbeiða við, tí ónøgdin um ov lítið samstarv á einstaka skúlanum er stór, serstakliga á Meginskúlanum.

Einasti glotti, ið er at hóma, er, at samstarvið á lítla skúlanum um KT, aftaná at KT-kortið er tikið, er hampuliga gott. Á Meginskúlanum er tað beinleiðis vánaligt.

## D. Lærarasamstarv millum skúlar í Sandoyar-Skúvoyar økinum

Í hesum fjórða partinum verður nomið við, hvat lærararnir sjálvir halda um tað samstarv, sum er millum skúlarnar í øllum økinum.

**Samstarv um undirvísing og ráðlegging:**
63% halda, at als einki samstarv er til, og tá bólkurin, sum heldur, at samstarvið er ov lítið, er taldur við, fáa vit talið 92%.

79% halda, at tað ongantíð verður samstarvað í toymum á skúlunum. Tó halda 21%, at tað kemur fyri av og á.

54% læna ongantíð tilfar til og frá starvsfeløgum. 46% gera tað av og á.

**Samstarvið eftir at KT-kortið er tikið:**
63% halda, at samstarvið um KT er vánaligt, eftir at KT-kortið er tikið. 21% halda, at tað er ikki nóg gott.

75% halda ikki, at arbeiðið við KT-kortinum hevur bøtt um vanliga samstarvslagið á skúlunum.

63% leita ongantíð starvsfelagar upp á øðrum skúlum fyri at biðja um samstarv á telduøkinum. 38% gera tað av og á.

Verður filtrið nýtt, og hugt verður eftir, hvat teir yngru lærararnir halda, so sæst, at í øllum teimum 7 spurningunum, verður svarað a ella b, t.v.s. at allir teir yngru lærararnir eru sera ónøgdir við samstarvið millum skúlarnar.

Niðurstøður: Tølini eru høg, tað er, sum um alt økið rópar eftir samstarvi.

100% av teimum yngru lærarunum halda, at einki samstarv er, ella at tað er ov lítið, men eisini teir eldru lærararnir kundu ynskt sær meira samstarv skúlarnar ímillum.

Arbeiðið við KT-kortinum hevur ikki bøtt stórvegis uppá hetta, og heilt onnur og meira umfatandi tiltøk mugu setast í verk, skal samstarvið koma í eina hægri legu.

## E. Námsfrøðiligt og tøkniligt samstarv millum skúlar við hjálp av KT-tøkni

Í hesum fimta parti verður hugt fram eftir í samband við KT-tøkni. Spurt verður um, hvat lærararnir halda fer at hava týdning fyri skúlarnar bæði á tí námsfrøðiliga og tøkniliga økinum.

**Týdning fyri næmingarnar:**
Umleið 80 til 90 prosent av lærarunum halda, at KT-tøknin fær týdning fyri: at næmingar fáa tøkniligar avbjóðingar við at samstarva við aðrar næmingar, fara at kenna seg sum partur av størri eind og fara at samstarva um evni yvir langar fjarstøður. Bert 29% halda, at KT-tøknin kann forða fyri fráflyting úr minni økjum í størri. Um 58% halda, at tøknin brúkast til at geva næmingum undirvísing øll skúlaárini í bygdaskúlunum.

**Týdning fyri lærararnar:**
Eisini her halda um 80 til 90 prosent av lærarunum, at KT-tøknin fær týdning fyri: at lærarar fáa tøkniligar avbjóðingar við at samstarva við aðrar lærarar, fara at kenna seg sum partur av størri eind, fara at samstarva um evni yvir langar fjarstøður og fara at fáa nýggjan íblástur frá starvsfeløgum. 71% halda, KT-tøknin fer at minka um einsemiskensluna á smáplássum. Bert 21% halda, at KT-tøknin fer at gera tað léttari at fáa lærarar út á tey smáu plássini.

**Týdning fyri skúlarnar:**
Um 80% av lærarunum halda, at KT-tøknin fer at hava týdning fyri: at tað verður léttari at samskipa felags tiltøk, léttari at læna tilfar frá øðrum skúlum, léttari at nýta felags undirvísingartilfar, léttari at samstarva um undirvísingarætlanir og léttari at fáa ráðgeving frá felags telduvørði.

Um 60% halda: at tað verður léttari at eiga amboð í felag, léttari at nýta felags telduvegleiðara og skúlabókavørð, léttari at nýta felags royndir, og at lærarakreftirnar í økinum verða brúktar effektivari.

Millum 40 og 50% halda, at KT-tøknin fer at hava týdning fyri at hava felags leiðslu og skúlavegleiðara í økinum.

**Leiðsla og ráðgeving á skúlunum:**
67% halda, at leiðsla og ráðgeving fyri skúlarnar eiga at verða spjadd millum skúlarnar og ikki miðsavnað.

Við filtrinum sæst, at 6 av 12 t.v.s. 50% á Meginskúlanum og 10 av 12 t.v.s. 83% á bygdaskúlunum hava hesa fatan. 50% av lærarunum á Meginskúlanum ynskja onga broyting, ella at alt skal vera á Meginskúlanum.

Niðurstøða: Sum heild kann sigast, at lærararnir í økinum halda, at KT-tøknin kann fáa stóran týdning fyri skúlaskapin í Sandoyar-Skúvoyar økinum.

Tó halda tey flestu ikki, at KT-tøknin kann minka um fráflyting úr smærri plássum og heldur ikki, at hon kann føra við sær, at tað verður lættari at fáa lærarar til smáu plássini.

Teir flestu bygdaskúlalærararnir eru av tí meining, at leiðslan og ráðgevingin eiga ikki aleina at liggja á Meginskúlanum. Á Meginskúlanum eru lærararnir í tvívingum um hetta mál.

## F. KT-menning

Í hesum parti verður hugt eftir um hugburðurin hjá lærarunum mótvegis teldum er broyttur í seinastuni, og um lærarar ynskja at menna skúlan á telduøkinum. Eisini verður hugt nærri at, um lærararnir halda, at skúlin er væl fyri í samband við framhaldandi menning innan KT og námsfrøði.

**Hugburður hjá starvsfeløgum móti teldum:**
96% siga, at hugburðurin millum starvsfelagarnar er broyttur positivan veg mótvegis teldum orsakað av KT-kortinum.

**Hugburður hjá leiðslum móti teldum:**
58% halda, at undirvísingin í samband við KT-kortið hevur als ikki broytt hugburðin hjá leiðsluni mótvegis teldum. 42% halda, at hugburðurin er broyttur positivan veg.

Við filtrinum sæst, at tølini fyri Meginskúlan eru: 10 av 12 lærarum t.v.s. 83% siga "als ikki broytt" og fyri smáu skúlarnar: 4 av 12 lærarum t.v.s. 33% siga "als ikki broytt" og restin 8 av 12 t.v.s. 67% siga "broytt positivan veg."

**Námsfrøðilig KT menning:**
67% halda, at allir ella næstan allir lærarar ynskja at menna skúlan á telduøkinum, tá hugsað verður um námsfrøðiliga partin.

Tølini fyri smáu skúlarnir eru 11 av 12 lærarum t.v.s. 92% og fyri Meginskúlan 5 av 12 t.v.s. 42%.

**Støðan á skúlanum:**
Um 90% halda, at tað er lætt at fáa loyvi til at brúka teldurnar, og at tey neyðugu forritini eru tøk.

67% halda, at skúlin hevur nóg mikið av teldum.

Um 50% halda, at teldurnar standa væl fyri, at hóskiligt KT-undirvísingartilfar er tøkt, at námsfrøðilig KT-leiðbeining er tøk á skúlanum, og at lærararnir ynskja at menna skúlan.

Um 40% halda, at lærararnir hava fingið námsfrøðiliga undirvísing í KT, og at skúlans leiðsla sýnir áhuga fyri KT í undirvísingini.

Um 30% halda, at lærararnir duga at brúka forritini, at lærararnir lata sínar KT-royndir til starvsfelagar, at skúlans leiðsla stuðlar upp undir eftirútbúgving á KT-økinum, og at lætt er at samstarva um námsfrøði á skúlanum.

Um 20% halda, at lærararnir eru vanir at samstarva, at tíð til lærarasamstarv er tøk, at skúlans leiðsla stuðlar upp undir toymisgerð, og at leiðslubygnaðurin er smidligur.

At kalla eingin heldur, at tíð til fyrireiking í KT er tøk, at undirvísingarhættirnir skifta javnan á skúlanum, og at undirvísingin er tvørfaklig.

Verður filtrið brúkt sæst, at 100% á Meginskúlanum halda, at nóg mikið er av teldum, á smáu skúlunum er talið 33%. 100% á Meginskúlanum halda, at námsfrøðilig KT-leiðbeining er tøk, á smáu skúlunum er tað eingin, ið heldur tað. Á smáu skúlunum eru tað 50%, sum halda, at skúlans leiðsla stuðlar upp undir KT-eftirútbúgving, á Meginskúlanum er tað talið 8%. Tað sama ger seg galdandi, tá spurt verður, um skúlans leiðsla sýnir áhuga fyri KT í undirvísingini. Á smá skúlunum eru tað 83%, sum halda, at lærararnir føla ábyrgd fyri skúlans menning. Á Meginskúlanum er talið 17%.

<u>Niðurstøður:</u> Tað tykist, sum um lærararnir eru við at venja seg við teldurnar, og at hugburðurin seinastu tíðina er broyttur positivan veg. Tað sama kann ikki sigast um hugburðin hjá leiðsluni á Meginskúlanum.

So at siga allir lærarar á smáu skúlunum halda, at lærararnir ynskja at menna skúlan á telduøkinum, men hetta ger seg ikki galdandi fyri lærararnar á Meginskúlanum, har minni enn helvtin heldur hetta.

Umstøðurnar á tí tøkniliga økinum tykjast sum heild at vera góðar fyri framhaldandi menning, tó halda nógvir lærarar á smáu skúlunum, at ov fáar teldur eru.

Verri er á námsfrøðiliga økinum, har allir lærarar á smáu skúlunum siga, at eingin námsfrøðilig KT-leiðbeining er tøk.

Teir nógv flestu lærararnir í Sandoyar-Skúvoyar økinum halda, at eingin tíð er tøk til fyrireiking í KT, at lærararnir eru ikki vanir at samstarva, at leiðslubygnaðurin er ikki smidligur, at ikki er lætt at samstarva um námsfrøði á skúlanum o.m.a. sum peikar sama veg.

<u>Viðmerking:</u>
Kann KT-tøknin gerast eitt amboð, ið knýtir lærararnar tættari saman, og fær teir at samstarva meira um undirvísingina, hevði tað lyft allan skúlaskap í økinum og skapt ein betri skúla fyri næmingarnar, og kanska at lærararnir høvdu trivist ein heilan hóp betri í sínum yrki.

## G. KT-kortið

Í hesum síðsta parti verður hugt eftir KT-kortinum. Hvat voldi høvuðbrýggj, hvønn týdning hevur kortið havt fyri lærarans persónlig menning og skúlans menning á telduøkinum. Eisini verður hugt at fyrimunum og vansum við KT-kort skeiðnum.

**Hvat voldi høvuðbrýggj:**
88% hildu, at ov lítil tíð var til sjálva undirvísingina.

Á leið 30 til 40% hildu, at tey høvdu høvuðbrýggj av: tøkniligum trupulleikum, ov fáum persónligum KT-fyritreytum og ov lítlari tíð til fyrireiking og samstarv við starvsfelagar.

Á leið 20% hildu: at tey høvdu trupulleikar av forritum, og av at undirvísingarhølini vóru ov vánalig. Eingin á Meginskúlanum var ónøgdur við telduhølini, men 5 av 12 t.v.s. 42% á smáu skúlumum vóru ónøgd við hølini.

So at siga eingin helt: at útgerð og forrit vantaðu, at undirvísingartilfarið var vánaligt, at atgongdin til telduhølið var avmarkað, at tey fingu ov lítla hjálp frá telduvegleiðaranum, at leiðslan stuðlaði ikki nóg væl, at ov lítið samanhald var millum starvsfelagarnar, og at stýringin og ráðleggingin av undirvísingini var vánalig.

**Persónlig menning:**
75% halda, at KT-kortið hevur havt eitt sindur av týdningi fyri persónligu menningina hjá teimum. 21% halda, at tað hevur havt stóran týdning.

**Skúlans menning:**
71% av lærarunum halda, at teirra luttøka á KT-skeiðnum fer at hava eitt sindur av týdningi fyri skúlans menning á á telduøkinum.

63% av lærarunum halda, at KT-kortið fer at hava stóran týdning fyri menningina av føroysku skúlunum á telduøkinum. 33% halda, at tað fer at hava eitt sindur av týdningi.

**Fyrimunir:**
